HALLÓ

# Hálka elvdi til seks ferðsluóhapp

**Løgreglan hevur havt eitt óvanliga friðarligt vikuskifti, men hálka er enn einaferð komin óvart á fólk, og tað elvdi til seks ferðsluóhapp**

Leo Poulsen



Limousinan rendi á ein garð og endaði inni í garðinum á einum húsum í Hósvík
Mynd: Ann Christiansen

Frost var um vikuskiftið, og sum ikki einaferð vóru tað bilførarar, sum vórðu tiknir á bóli.

Løgreglan hevur fingið fráboðan um fimm ferðsluóhapp, og hartil veit Sosialurin um í eitt aftrat, sum higartil ikki er meldað til løgregluna.

Hósvík hevur veirð miðdepilin fyri óhappunum, og seint leygarkvøldið hendi tvey við bert fýra minuttum ímillum. Klokkan 23.47 fekk løgreglan fráboðan um hitt fyrra og klokkan 23.51 var aftur fráboðan um eitt ferðsluóhapp í Hósvík orsakað av hálku.

Í báðum førum hendi eingin fólkaskaði, og málið var bert ein tryggingarspurningur.

Leygarnáttina – sum skilst um trítíðina – rendi ein limousine inn í ein betonggarð, sum hann breyt, og endaði inni í garðinum. Tann tilburðurin er ikki meldaður til løgregluna.

Leygarmorgunin fór ein bilur á glið í Kvívík í brekkuni niðan móti skúlanum og endaði úti av vegnum, og klokkan 10.30 leygarmorgunin rendi ein bilur inn í ein betonggarð á Glyvrum.

Seinasti tilburðurin var leygarmorgunin klokkan knapt sjey, tá ein bilur fór út av vegnum millum Effostøðina í Kollfkarðadali og Leynatunnilin.




## Føroyingur innibrendur í Tønder

*Sunnunáttina brendi ein føroyingur og ein vinmaður hansara inni í einum brandi í danska býnum Tønder.*

Løgreglan fekk boð um eldin tíðliga sunnumorgunin, men tað eydnaðist ikki at sløkkja eldin nóg skjótt til at bjarga teimum báðum ungu monnunum, ið inni vóru.

Tað var tann 25 ára gamli danin, Evan Bennedsen, ið búði í húsunum, meðan tann 20 ára gamli føroyingurin, Dan Ejler Richmond, ið annars býr í Løgumkloster, lá nátt hjá vinmanninum.

Teir báðir vinmenninir arbeiddu í Jysk í Tønder, og har er starvsfólkið skelkað og fær sálarliga hjálp.

Kanningararbeiðið er enn ikki liðugt, men løgreglan arbeiðir við einari teori um, at royking í seingini kann hava verið orsøkin til eldin, skrivar Jyske Vestkysten.

## Í MORGIN

**5/8 °C**



11-16 m/s — 6-11 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Sólglottar, men regn eitt skifti. Hitin millum 5 og 8 stig.

## MIKUDAGIN

**7/10 °C**



10-15 m/s — 12-17 m/s

Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, seinnapartin nakað minni vindur av suðri. Fyri tað mesta turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

## HÓSDAGIN

**7/10 °C**



7-12 m/s — 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig

## LUFTTRÝSTIÐ



**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1015 hPa. yvir Íslandi fer eystureftir.



**Komandi nátt:**
Lágtrystið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 | | |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 | | |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 | | |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 | | |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 | | |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 | | |

## VESTFALLSKYRRINDI

13. nov — Fyrra kvarter
15. nov — Mánin longst frá jørðini
21. nov — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. nov | 01:56 | 14:15 | 00:56 | 13:15 | 01:11 | 13:30 | 03:56 | 16:15 | 04:56 | 17:15 | 00:11 | 12:30 | 11:30 | 23:50 | 02:11 | 14:30 | 03:11 | 15:30 | 01:41 | 14:00 | 02:56 | 15:15 |
| 16. nov | 02:35 | 14:52 | 01:35 | 13:52 | 01:50 | 14:07 | 04:35 | 16:52 | 05:35 | 17:52 | 00:50 | 13:07 | - | 12:07 | 02:50 | 15:07 | 03:50 | 16:07 | 02:20 | 14:37 | 03:35 | 15:52 |
| 17. nov | 03:09 | 15:27 | 02:09 | 14:27 | 02:24 | 14:42 | 05:09 | 17:27 | 06:09 | 18:27 | 01:24 | 13:42 | 00:24 | 12:42 | 03:24 | 15:42 | 04:24 | 16:42 | 02:54 | 15:12 | 04:09 | 16:27 |
| 18. nov | 03:45 | 16:03 | 02:45 | 15:03 | 03:00 | 15:18 | 05:45 | 18:03 | 06:45 | 19:03 | 02:00 | 14:18 | 01:00 | 13:18 | 04:00 | 16:18 | 05:00 | 17:18 | 03:30 | 15:48 | 04:45 | 17:03 |
| 19. nov | 04:22 | 16:42 | 03:22 | 15:42 | 03:37 | 15:57 | 06:22 | 18:42 | 07:22 | 19:42 | 02:37 | 14:57 | 01:37 | 13:57 | 04:37 | 16:57 | 05:37 | 17:57 | 04:07 | 16:27 | 05:22 | 17:42 |